# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.09.2017*

**Bygdaráðsfundur: 25.09.2017 kl. 18.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 68/2017 Ognir og hølir**
J.nr. 82.00.00-P20-1-17
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av keyp av høll til Skálafjarðar Sløkkilið. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 29.08.2017.

Hølisumstøðurnar hjá SKS eru trongar og hevur SKS nú møguleika at keypa ein bygning á Skála, sum kann hýsa part av virkseminum hjá SKS.

Íløgukostnaðurin verður at býta javnt eftir íbúgvartalinum í Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunum. Kostnaðurin fyri Nes kommunu er kr. 493.511.

**Tilmæli**
Á fundi 23.08.2017 mælir Fíggjarnevndin til, at peningurin, fyri høllina, verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 69/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**
J.nr. 18.15.00-S49-1-16
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av eyka stuðli til Ungdómshúsið. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 29.08.2017.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.09.2017*

Í skrivi 07.08.2017 takkar nevndin fyri Ungdómshúsið Nes Kommunu fyri stóra vælvild og gott samstarv við at finna loysn á hølisspurninginum, nú "Banknordik-bygningurin" varð seldur.

Í samband við flytingina er neyðugt at keypa ymiskt nýtt, og hevur Ungdómshúsið fingið heimasíðu: www.uh.fo. Heitt verður á Nes Kommunu um at veita Ungdómshúsinum ein fíggjarligan eyka stuðul í ár á kr. 20.000,00.

**Tilmæli**
Á fundi 17.08.2017 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Ungdómshúsinum eyka stuðul áljóðandi kr. 20.000,00.

Á fundi 23.08.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Tilmælið frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 70/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-18-17
**Málslýsing**
Í skrivi 24.08.2017 søkja Ann og Høgni Hansen um byggiloyvi til havastovu, sum verður á vestursíðuni á sethúsum teirra undir Nesinum 2. Havastovan kemur ístaðin fyri terassuna, sum verður tikin burtur.

**Tilmæli**
Á fundi 12.09.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta Ann og Høgna Hansen byggiloyvi til havastovu, á vestursíðu, á sethúsinum á matr. nr. 746h, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Høgni Hansen var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 71/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-13-16
**Máslýsing**
Í skrivi 12.08.2017 søkir 2XJ Bygging v/Jógvan Joensen, vegna Inga á Steinamørk, um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 474ý á Lýðarsvegi.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.09.2017*

**Tilmæli**
Á fundi 12.09.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta Inga á Steinamørk byggiloyvi til sethús á matr. nr. 474ý, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 72/2017 Veitingarvirksemið el, vatn o.a.**
J.nr. 13.02.00-P20-1-17
**Málslýsing**
Ein ofta umrøddur trupulleiki er tað lága vatn- trýstið á høgt liggjandi býlingum í Nes kommunu.

Nú fyriliggur eitt projekt og ein kostnaðarmeting frá PB-Consult, uppá eina pumpuskipan sum kann loysa trupulleikan.

Kostnaðarmetingin er áljóðandi kr. 1.200.000,00 uttan mvg. Samsýning og møguliga umleggingar av vatnveiting niðri í bygdini er ikki við í kostnaðarmetingini.

**Tilmæli**
Á fundi 12.09.2017 mælir Tekniska nevnd til, at pumpuskipan verður set upp við vatnbrunnarnar, og at íløgan verður tikið við í viðgerðini av fíggjarætlanin fyri 2018.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 73//2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-19-17
**Málslýsing**
Í skrivi 10.09.2017 søkir Ingemar Højgaard um loyvi til at byggja hjall á egnum grundstykki matr. nr. 746o.

**Tilmæli**
Á fundi 12.09.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta Ingemar Højgaard byggiloyvi til hjall á matr. nr. 746o, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.09.2017*

**Mál nr. 74/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 02.01.00-P20-4-17

**Málslýsing**

Í skrivi 04.09.2017 sendir Búnaðarstovan til ummælis, umsókn frá Anelinu og Justin Philbrow, um uppískoytisstykki burtur av matr. nr. 337a.

**Tilmæli**

Á fundi 12.09.2017 mælir Tekniska nevnd frá at viðmæla keyp, men at tey fáa loyvi til at leiga lendið grundað á, at økið omanfyri er lagt út sum íbúðarøkið.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 75/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**

J. nr. 02.34.02-P20-12-17

**Málslýsing**

Í skrivi 11.09.2017 søkir Sp/f Spenn, í Leirvík, vegna Sp/f Jákup Hansen, um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699ad á Gaddavegnum.

**Tilmæli**

Á fundi 12.09.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta Sp/f Jákup Hansen byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699ad, eftir ávísum treytum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 76/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.05.03-G01-1-17

**Málslýsing**

Jólatrøini 2017 skulu tendrast. 1. sunnudagur í atvent er 03.12.2017.

**Tilmæli**

Á fundi 13.09.2017 mælir Mentanarnevndin til at jólatrøini tendra 02.12.2017 kl. 16.00.

Aftaná verða kakao og bollar at fáa í kirkjukjallarinum. Síðani verður konsert, í Fríðrikskirkjuni við luttøku av lokalum sangkreftum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.09.2017*

**Mál nr. 77/2017 Alment virksemið yvirhøvur**
J. nr.00.05.03_G01-2-17
**Málslýsing**
Minningarhald teirra sjólátnu 1. novembur, sum er ein mikudag, stundar til, og tí er neyðugt at biða prest ella annan halda røðuna við minnisvarðan.

**Tilmæli**
Á fundi 13.09.2017 mælir Mentanarnevndin til at hava minningarhaldið í Fríðrikskirkjuni, síðan verða kransar lagdir við minnisvarðan. Kommunan bjóðar kaffi o.a. í kirkjukjallaranum eftir minningarhaldið.

Tosað við Ova Brim, prest um at hava minningarhaldið 1. novembur 2017.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 78/2017 Undirvísing**
J.nr. 17-04-07-G01-1-17
**Málslýsing**
Í skrivi 07.09.2017, frá borgarum, hevur kommunan fingið fyrispurning um møguleikan at hava brúdleyp í fimleika- og miðhøll skúlans.

**Tilmæli**
Á fundi 13.09.2017 mælir Mentanarnevndin frá at leiga høllina og miðhøllina til brúdleyp.

Á fundi 18.09.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 79/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**
J.nr.18.15.01-S49-1-17
**Málslýsing**
Eftir áheitan frá kvøldskúlaleiðaranum, viðgjørdi fíggjarnevndin gjaldið fyri kvøldskúlan. Tey seinastu árini hevur gjaldið verið kr. 400,00 fyri eitt kvøldskúlaskeið, og kr. 200,00 fyri stytri skeið.

**Tilmæli**
Á fundi 18.09.2017 mælir Fíggjarnevndin til at hækka gjaldið upp í kr. 500,00 fyri eitt kvøldskúlaskeið, og kr. 250,00 fyri stytri skeið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 25.09.2017*

**Mál nr. 80/2017  Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-3-17
**Málslýsing**
Ásetan av fíggjarkarmi fyri 2018 – 1. viðgerð

Á fundi 18.09.2017 hevur Fíggjarnevndin viðgjørt fíggjarkarmin fyri 2018.

**Tilmæli**
Fíggjarnevndin mælir til at áseta fíggjarkarmin fyr 2018 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Skattainntøkur | kr. | 51.438.000 |
| Rakstrarútreiðslur | kr. | 44.740.000 |
| Úrslit áðrenn avdrøg/íløgur | kr. | 6.698.000 |

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 82/2017 Tilbúgvingarvirksemið**
J.nr. 14.00.00-P15-1-17
**Málslýsing**
Á bygdarráðsfundinum 26. juni var uppskot til nýggja Tilbúgvingarætlan samtykt fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið ( SKS ).

Uppskotið til nýggja tilbúgvingarætlan skal samtykkjast av øllum 3 kommununum, sum samstarva um SKS. Sjóvar kommuna hevur eins og Nes kommunu samtykt uppskotið tann 26. Juni.

Runavíkar Býráð hevði uppskotið um Tilbúgvingarætlan til viðgerðar á býráðsfundi tann 29. juni og samtykti uppskotið við hesari broyting:

**Broyting til § 11.**
**Í staðin fyri at siga** "Fyri at taka av – og koma burturúr – felagsskapinum, skulu minst 2/3 av kommununum hava samtykt at taka set burturúr felagnum"

**So heldur** "Ynskir ein kommuna at fara úr felagsskapinum, er uppsagnarfreistin eitt ár frá einum 1. januar at rokna".

Broytingin hjá Runavíkar kommunu, sum hon hevur til uppskotið um nýggja Tilbúgvingarætlan fyri SKS, skal góðkennast av hinum báðum kommununum í samstarvinum og verður hervið lagt fyri bygdarráðið í Nes kommunu til støðutakan.

**Avgerð**
Bygdaráðið samtykti at taka undir við broytingini.